## Trygt í New York



Árið í ár hevur verið so friðarligt í New York, at tað hevur ikki verið so trygt at vera New York-búgvi tey seinastu 40 árini. Hagtølini hjá løgregluni vísa, at 461 fólk eru myrd í New York í ár, og so lítið hevur talið ikki verið síðani 1963. Samstundis hava tað verið nógv færri neyðtøkur, rán og innbrot. Áhugavert er tað, at hetta er hent, samstundis sum løgreglumenninir í býnum eru fækkaðir úr 41.000 í 34.000 tey seinastu átta árini. Hinvegin hevur tað helst virkað tálmandi, at nógv lógarbrot verða revsað harðari enn fyrr, skrivar AP.

## Tikin í Norðurkorea

Myndugleikarnir í Norðurkorea váttaðu í nátt, at teir tóku ein amerikanskan ríkisborgara í síðstu viku. Tann almenna tíðindastovan KCNA skrivaði, at maðurin bleiv tikin, tá hann kom um markið úr Suðurkorea jólaaftan. Amerikonsku myndugleikarnir kunngjørdu um vikuskiftið, at tann 28 ára gamli Robert Park var farin til Norðurkorea jóladag. Park, sum er av koreonskum uppruna, hevur sagt, at hann hevur fingið eina áheitan frá Guði um at fara til Norðurkorea at virka fyri, at landið fær frælsi og frelsu, skrivar Reuters.

# Ov nógvir fátækir danir

**Flestu danir halda, at politikkararnir gera ov lítið fyri at steðga fátækradøminum í Danmark**

SAMFELAG
*Snorri Brend*



*Ein alt ov vanlig mynd í Danmark: Eldri kvinna sum rótar í einum ruskílati*

**Danmark:** Tendensurin er púra greiður:

Fleiri fyrispurningar um jólahjálp. Flóttafólk sum ikki hava ráð til dagliga breyðið seinast í mánaðinum. Og tøl sum vísa, at fleiri børn og vaksin liva sum fátæk í longri tíðarskeið.

Hesin veruleikin hevur í hesum mánaðinum verið orsøk til fleiri greinar, innsløg og orðaskifti í bløðum, útvarpi og sjónvarpi - og ikki minst í fundarhølunum á Christiansborg.

Nú vísir ein nýggj meiningarkanning, sum Capacent hevur gjørt fyri Kristelig Dagblad, at evnið eisini hevur stóran áhuga hjá manninum á gøtuni:

Ein meiriluti av fólkinum heldur nevniliga, at talið av fátækum í Danmark er alt, alt ov høgt.

*Ein meiriluti av fólkinum heldur, at talið av fátækum í Danmark er alt, alt ov høgt*

Kanningin er gjørd millum 1169 danir omanfyri 18 ár, og annarhvør teirra er av hesi sannføring. Hinvegin eru 17 prosent ósamd í útsøgnini um, at tað eru ov mong fátæk í landinum.

### Arbeiðsloysi

Eitt annað áhugavert við kanningini er, at flestu danir halda, at fátækradømið er ein vaksandi trupulleiki í Danmark.

- Eg haldi, at tað er ógvuliga natúrligt at fólk halda hetta, sigur Martin Henriksen úr Danska Fólkaflokkinum.

Hann er formaður í Sosialu nevnd í Fólkatinginum, og heldur, at orsøkin til støðutakanina hjá dønum er, at fíggjarkreppan rakar mong og er nógv frammi í miðlunum.

- Tað eru eisini mong, ið kenna onkran sum er raktur av arbeiðsloysi.

Martin Henriksen er vitandi um, at mong fólk hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman, og onnur eru skuldarbundin langt upp um skorsteinin.

- Onnur hava trupult við at skipa seg fíggjarliga, tí tey hava ikki ráð til tað sum tey áttu, og tí tey raðfesta skeivt. Tað kann vera so mangt sum spælir inn, sigur hann.

### Álvarsmál

Ein annar politikkari á Christiansborg, Özlem Cekic, sum er framsøgukvinna í sosialmálum hjá Socialdemokratunum, sær kanningina øðrvísi.

Sambært henni vísir kanningin, at danir fegnir vilja stríðast ímóti og fyribyrgja fátækradøminum.

- Tað lættir um hjartað mítt, at danir halda hetta vera ein týdningarmikil trupulleiki, sum okkurt má og skal gerast við, sigur Özlem Cekic.

Kanningin gevur politikkarunum á Christiansborg eina lýsing av, at tey skulu taka henda trupulleikan í størsta álvara.

Meirilutin av teimum spurdu halda nevniliga, at politikkararnir gera ov lítið fyri at minka um fátækradømið í Danmark.



## Skip aftur í dokkini

**Skáli:** Tað var tann tíð, tá nógv og regluligt virksemi var á havnarlagnum á Skála. Tá fingu hundraðtals fólk sína inntøku frá skipasmiðjuni har, men virksemið er so líðandi minkað – í roynd og veru niður í einki! Í eina tíð var einki arbeiði á skipasmiðjuni, men nú síggjast tíbetur aftur skip við bryggju, eins og skip hava verið í dokkini.

## Nógv virksemi á havnalagnum

**Runavík:** Uttan landingarmiðstøðina Kongshavn hevði neyvan verið so nógv virksemi, sum verið hevur í ár. Í kommununi kunnu tey bara staðfesta, at virksemið er økt ár undan ári, og hevur hetta árið verið tað besta nakrantíð hjá landingarmiðstøðini. Nógv føroysk fiskiskip hava ligið við bryggju, umframt fleiri russisk og okkurt ferðamannaskipið. Men nú verður við spenningi sæð fram móti 2010. Boðað er nevniliga frá, at farið verður at bora eftir olju til várs, og tað fer at føra til økt virksemi á havnalagnum í Runavík, har fleiri installasjónir eru gjørdar júst í hesa vinnuna.

# Javnvág við 99 mió krónum

**Runavík:** Við einum skattaprosenti uppá 22 væntar Runavíkar kommuna at fáa 99 mió krónur inn í skatti komandi ár – 97 frá persónsskatti og 2 frá partafelagsskatti.

Hetta kom fram í umrøðuni av fíggjarætlanini fyri 2010, sum javnvigar við 99,021 mió krónum.

Á útreiðslusíðuni fer ikki óvæntað størsta játtanin til raksturin, sum er mettur til 69,271 mió, meðan íløgur og fíggjarkostnaður eru góðar 13 mió hvør.

Skattaprosentið verður óbroytt komandi ár, og tað er barnafrádrátturin eisini – 4000 krónur.

Nevnast kann, at kommunuskuldin í Runavík er við árslok farin upp um eina álíkning, men ætlanin er koma undir eina álíkning í skuld í komandi ári.

**sb.**



*Sama skattaprosent og óbroyttur barnafrádráttur í Runavík*